## Evstamark hjá Vencili nærkast

Skaldskapartíðarritið Vencil boðar frá, at freistin at lata inn tilfar til fimta nummar av ritinum er 15. august 2008. Ritstjórarnir á Vencil gera vart við, at øll kunnu senda inn stuttsøgur, yrkingar og ritroyndir - bæði á upprunaføroyskum og týddar - og at ritstjórnin eftir førimuni svarar øllum aftur og gevur góð ráð. Víst verður eisini til heimasíðuna hjá Vencili, www.vencil.fo, har mangt eitt hyggjuráð til komandi høvundar er at finna. Vencil Nr. 5/2008 kemur eftir ætlan út síðst í september 2008.




# Sjóvevur aftur á skránni í Leikalund



*Einsamøll á palli tekur Eyð Matras áskoðararnar við á hendingaríku ferðina hjá Ainu Cederblom tvørtur um Atlantshavið*

*Mynd: Høgni Thomsen*

**Tey, ið ikki náddu tað í vár, fáa nú høvi at síggja leikin Sjóvevur, sum vann sjónleikaranum Eyð Matras Ársins Herðaklapp frá Tjóðpalli Føroya**

SJÓNLEIKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í samband við 100 ára hátíðarhaldið hjá Klaksvíkar Kommunu og Sjómannadagin, verður einrøðuleikurin Sjóvevur nú tikin uppaftur. Leikurin varð frumframførdur í vár í Leikalund, og sóu tá útvið 1000 fólk leikin.

### Einsamøll á palli

Í leikinum hevur Eyð Matras leiklutin sum Aina Cederblom, og er hon einsamøll á palli í útvið tveir tímar á longu ferðini hjá Cederblom tvørtur um Atlantshavið. Fyri hetta avrikið fekk Eyð Matras Ársins Herðaklapp frá Tjóðpalli Føroya og MáF fyrr í ár

Í grundgevingini fyri at lata Eyð Matras Herðaklappið varð millum annað sagt, at hon vísti framúr evnir til at liva seg inn í leiklutin hjá órædda globetrottaranum og íverksetaranum Ainu Cederblom. Hartil livdi Eyð Matras seg inn í ein meldur av hendingum millum menniskju í norðurhøvum í tríatiárunum, og hon tók á sannførandi hátt áskoðararnar við sær á ógloymandi ferðina.

Tað var Karin Kjølbro, sum handaði Eyð Matras virðislønina. Í hesum sambandi legði hon áherðslu á, at tað av sonnum kendist sum ein heildaruppliving at fara gjøgnum undirsjóvartunnilin til sjónleik í skjótt 200 ára gomlu handilshúsunum úti í Klaksvík, ið Eyð Matras hevur gjørt til leikhús, har Rospiggen II er at síggja uttanfyri.

- Vit loyva okkum at vóna, at sjónleikurin Sjóvevur verður fastbúgvandi í hesum leikhúsi, til reiðar at taka tey við á ferðina, ið koma til Klaksvíkar til hátíðarhald hjá Klaksvíkar Kommunu ella Sjómannadagin, segði Karin Kjølbro.

### Einsamøll í báti

Nú verður so ynskið hjá Karini Kjølbro, og uttan iva mongum øðrum, til veruleika. Í næstu viku verður leikurin nevniliga tikin uppaftur í Leikalund í Klaksvík, og tá sleppa áskoðarar aftur við á hendingaríku ferðina hjá svensku Ainu Cederblom, sum í 1933 sigldi í sínum lítla motorbáti Rospiggen II úr Svøríki til Føroyar og víðari til Grønlands og Amerika. Leikurin lýsir harðbalnu ferðina um Atlantshavið, lívið umborð á skonnartini Stellu Mariu og lívshættisliga stríðið Aina upplivdi í pakkísinum.

Aina Cederblom ferðaðist víða kring heim. Hennara endamál var at hjálpa og at geva kvinnum eitt amboð til at gerast sjálvbjargnar, og setti hon á stovn vevskúlar, allastaðni har hon kom.

Í Klaksvík eru nógv spor eftir Ainu Cederblom. Hon lat millum annað byggja Vevskúlan úti í Grøv, sum er virkin enn tann dag í dag, og bátur hennara Rospiggen II er eisini í Klaksvík. Báturin verður sýndur fram niðanfyri Fornminnissavnið og Leikalund, dagarnar leikurin verður spældur. Harafturat ber til at síggja svart/hvíta filmin "Som sjøluffare på Atlanten", sum Aina sjálv tók upp á ferð síni. Í filminum eru forvitnisligar myndir at síggja, serliga av manningini á Stellu Mariu.

Umframt Eyð Matras, er manningin aftanfyri Sjóvevur hendan: Sígrún Valbergsdóttir, ið hevur skivað leikritið og leikstjórnað. Magni Husgaard, sum eigur tónleikin og framførir til hvørja sýning. Árni Baldvinsson, ljósseting og Edward Fuglø, pallseting og búna.

### FAKTA

Leikurin Sjóvevur verður sýndir hesar dagar í Leikalund í Klaksvík.

| | |
|---|---|
| Hósdagin | 14. august kl. 19.00 |
| Fríggjadagin | 15. august kl. 19.00 |
| Leygardagin | 16. august kl. 20.00 |
| Sunnudagin | 17. august kl. 17.00 |

Farið verður ikki at ferðast við leikinum.

Atgongumerki kunnu bíleggjast í Norðoya Kunningarstovu tlf. 45 6939. ella info@klaksík.fo



*Lítli báturin hjá Ainu Cederblom, Rospiggen II, verður at síggja niðanfyri Leikalund, meðan leikurin Sjóvevur verður spældur*

*Mynd: Dávur Winther*